# TILTØK

**Gudstænastur**
**1. sunnudag eftir páskir**
*Christianskirkjan:* kl. 11, altarg., Hans Eiler Hammer
*Havnar kirkja:* kl. 11, Sonja Klein (Talvan gongur fyri Bláa Kross í Føroyum)
***kl. 15*** Grønlendsk gudstænasta, Jens Chr. Kleist
*Vesturkirkjan:* kl. 11 familjugudstænasta, Bergur D. Joensen
*Argir:* kl. 11 lestur,
***kl. 14,*** familjugudstænasta, Bergur D. Joensen. Barnakórið syngur. Børnini møta kl. 13.00
*Gøta:* kl. 11, konfirmatión, Martin R. Jacobsen
*Kollafjørður:* kl. 11, Marjun Bæk
*Kirkja:* kl. 12, altarg.,
*Hattarvík:* kl. 17, altarg., Elsa Funding
*Bøur:* kl. 11, David Johannesen. (Sunnudagin 27. apríl verður farið í kirkju kl. 11 í Sandavági, Miðvági, Sørvági og Bø)
*Hov:* kl. 11, John Myllhamar
*Vágur:* kl. 11, Ólavur Rasmussen
*Norðskála:* kl. 11, konfirmatión, Emil Olsen
*Skálavík:* kl. 12, altarg., Jákup R. Hansen
*Kaldbak:* kl. 12, SVF Sverri Steinhólm

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti. Ímeðan er barnaansing. Kl. 11.30 Samvera við drekkamunni. Kl. 12 Sunnudagsskúli og møti. Leivur Steintún talar. Heimasíða: www.hebron.fo

**Aglow, Tórshavn**
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið 26. apríl kl. 19.30, allar kvinnur eru vælkomnar.

**Ebenezer**
Leygarkvøldið kl. 20 talar Ian Burness har evnið verður »Trúgv á Gud í okkara tíð«
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti har Ian Burness frá Echoes of Service talar, kl. 21 Útimøti.
Mikukvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Meinigheitshúsið**
Leygarkvøldið kl. 19.30-22 Juniorhugni.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Familjumøti við Durutu og Ejvind Mouritsen har sunnudagsskúlabørn spæla leik og syngja. Drekka verður aftaná.
Mánakvøldið kl. 20 Kvinnumøti.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti, øll eru vælkomin.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 11 Møti v/ Toril og Niels Edvard Olsen, kl. 17 Familjutími við drekkamunni.
Títtlingasangarar skipa fyri. Øll eru vælkomin. (Eingin sunnudagsskúli).

**Samkoman Immanuel**
Sunnudagin kl. 13 Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman Johs. Andr. Næs sigur frá um nakrar sálmar, sum Jóan Chr. Poulsen í Hesti hevur umsett.

**Samkoman Rhema**
Sunnudagin kl. 11 Møti og sunnudagsskúli, Fríðtór Debes talar. Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Í morgin kl. 11 Morgunmøti v/ Sam Jacobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 16 Samkomufundur.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin. www.filadelfia.fo

**Samkoman Lívdin**
Sunnumorgin í Hoyvíkar skúla verður familjumøti kl. 10.30 og tilbiðjunarmøti kl. 12, til bæði møtini talar Ian Burness. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum.
Sunnudagsskúlin er kl. 12.
Drekkamunnur er millum møtini.
Týskvøldið kl. 19.30 úti á Fløtum. Bøn og bíbliutími har Zacharias Zachariasen talar um Nehemia. Heimasíðan: www.livdin.fo

**Ísraelsfelagið**
skipar fyri almennum fundi í høllini á Hotel Hafnia sunnudagin kl. 14.30, har Símun Absalonsen fer at halda fyrilestur um evnið: »Ísrael og vit«.

**Aglow, Norðstreymoy**
Møti verður í Glæmuni í Kvívík leygarkvøldið kl. 20. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 18 Evangel. møti við Helga Henriksen.
Mánadagin kl. 20 Bønarmøti.
Telefonandaktin 424741

**Vestmanna Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 19 Møti við Torleif Johannesen, sjómanstrúboðara.

**Lívsins Orð**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti við Pola Jacobsen og kl. 17 við Kára Jacobsen.
Mánadagin kl. 20 Ungdómsmøti.

**Tofta missiónshús**
Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20 við Ernst Hansen. Evni: Hvat merkir tað at liva ævigt?

**Keldan í Skálafirði**
Leygardagin kl. 21 Opið hús v/ Arna Abrahamsen.
Sunnudagin kl. 17 Møti v/ Paula Høj, kl. 17 Barnamøti.
Tú ert vælkomin í Kelduna.

**Thabor, Fuglafjørður**
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.

**Missónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsongsløta, kl. 18 Møti.
Innsavnan til húsið. Øll eru vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

**Aglow, Klaksvík**
Møti verður á Soli Deo Gloria leygarkvøldið 26. apríl kl. 20. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**KFUM & K í Klaksvík**
*Ungdómsvikuskiftirmøti:*
Fríggjadagin kl. 20 Møti í Christianskirkjuni við Bergur Debes Joensen Evni: »Fylg mær«, sangur: ASKAM, Drekka aftaná. Kl. 23 Konsert við VOX.
Leygardagin kl. 10 Bíbliutími við Bergur Debes Joensen. Evni: »Fylg mær – hvussu«. Kl. 20 Møti við Hans Kristian Jóhannessen, Gospelkórið »Gleði« luttekur. Drekka aftaná. Kl. 23 Sang og vitniløta.
Sunnudagin: kl. 11 Gudstænasta við altarg., í Christianskirkjuni kl. 11, kl. 14 Familjumøti, kl. 18 Møti við Pól Jóhannessen, barnakórið syngur, kl. 21 Sang og vitniløta. Øll hjartaliga vælkomin til øll tiltøkini.

**Missiónshúsið í Hovi**
Missiónsvika verður við møtum fríggjakvøldið og leygarkvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 18. John S. Myllhamar, trúboðari o.o. tala. Sunnukvøldið er innsavnan.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Leygarkvøldið kl. 20 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14. Vegna møti í Hovi verður einki møti sunnukvøldið.

**Missiónshúsið í Vági**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Onki møti vegna missiónsviku í Hovi.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Leygarkvøldið kl. 20 Bøn- og lovsongsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti við Ester og Malan.
Mánakvøldið kl. 20 Heimaforbundið.

**Sion, Vágur**
Sunnumorgunin kl. 11 Morgunmøti við breyðbróting, kl. 18 Evangel. møti.
Mánakvøldið kl. 21 Bønarmøti.

**Møti verður**
leygardagin 26. feb. kl. 19.30 í Zions Kirkens Sognehus, sum liggur á Nygårdsvej 103 í Esbjerg. Árant Johannsen talar. Bønarmøti byrjar kl. 19.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 28. apríl*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-18 Veving á loftinum
kl. 14-18 Kortspæl, landastrok, telving, dart og onnur spøl
**Túrurin mikudagin til Váganar, skal gjaldast áðrenn, 200 kr.**
*Týsdagin 29. apríl:*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Sangur, Jóhann R. Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 Hugleiðingar um at verða gamal. Jógvan Fríðriksson
*Mikudagin 30. apríl:*
Tilhaldið stongt í dag. **Túrur til Váganar. Úr Steintúni kl. 10. Vitja verður í Sandavágs kirkju, bygdasavnið í Miðvági, Kálvalíð, døgurði á Hotel Vágum kl. 12. Síðan verður vitja í Bø. Aftur í Havnini kl. 16. Kostnaður 200 kr. gjaldast áðrenn. Ferðaleiðari verður við á túrinum.**
*Hósdagin 1. mai*
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát – Brandur Petersen
*Fríggjadagin 2. mai:*
kl. 10-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Sunnudagin 27. apríl verður kommunumark gingið: Hundsarábotnur-Leynavatn. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Gingið verður uml. 3 tímar. Havið heit og góð gonguklæði og matpakka við. Tilmelding.

**Eysturoyar Gongufelag**
Sunnudagin 27. apríl verður spákingartúrur í Fuglafirði á skránni. Frásøgumaður er Petur Martin Petersen. Møtt verður við Kunningarstovuna í Fuglafirði kl. 14.

**Dagtilhaldið í Vági**
er opið hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15.00-18.00. Øll kunnu vera við.

**Tilhaldið í Sandoynni**
Tilhaldið er opið mánadag og mikudag frá kl. 14–17.00. Drekkamuður er at fáa báðar dagarnar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## BRÚDLEYP

Tann 24. apríl *giftust* í Prestagarðinum í Havn Marianna Berg og Jóhannes Tauser. Adr.: Hotel Hebron, Helgolandsgade 4, København.

Leygardagin 17. mai kl. 18.00 giftast í Kollafjarðar kirkju Sunneva Petersen, Skálavík og Sofus Kristian Joensen, Kollafjørður. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Kollafirði. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið á hjúnabandsdegnum biðjast vinarliga siga frá á tlf. 421815 ella 224804 áðrenn 1. mai.

Leygardagin 17. mai kl. 10.00 giftast í Býráðshúsinum í Tórshavn Lisbeth á Marknagil, Klaksvík og Jóannes Næs, Hvalba. Veitslan verður á Hotel Føroyum kl. 13.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið á hjúnabandsdegnum biðjast vinarligast siga frá á tlf. 456240, 265474, 375185, 221020 áðrenn 3. mai.

Leygardagin 17. mai kl. 16.00 giftast í Vestmanna kirkju Finngerð Egilsnes, Vestmanna og Ingolf Debes, Oyri. Veitslan verður í Eydnuni á Oyrarbakka kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið á hjúnabandsdegnum biðjast vinarliga siga frá á tlf. 424370, 424145 ella 422131 áðrenn 26. apríl.

Leygardagin 24. mai kl. 14.00 giftast í Nebo á Toftum Sóleyð Poulsen, Eiði og Heri Jacobsen, Toftir. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleðast saman við brúðarparinum, biðjast vinarliga um at siga frá á tlf. 423101, 222142 ella 222027 áðrenn 10. mai.

Leygardagin 31. mai kl. 16.00 giftast í Vágs kirkju Ásla Djurhuus úr Vági og Sámal Pauli Johannesen úr Vági
og 27. mai hava Heidi og Mikkjal Djurhuus úr Vági silvurbrúdleyp
og 27. mai hevur Joselyn Niclasen úr Froðba 70 ára føðingardag. Veitslurnar verða í VB-húsinum 31. mai kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma verða biðin at siga frá á tlf. 373233, ella 262687 í seinasta lagi 30. apríl.

Leygardagin 7. juni kl. 16.00 giftast í Vesturkirkjuni Ingunn Innerdahl Hansen, Skopun og Petur Petersen, Havn. Veitslan verður fyri innbodnum í HB-húsinum kl. 19.00.

Tann 5. juli kl. 16.00 giftast í Guldager kirkju Súsanna Maria Gudmundsson, Norðragøta og Stefano Bove Formia Italia. Dagurin verður hildin í festsalinum á Tvillingernes kvt. 88, 6710 Esbjerg V. Tey, ið ynskja at gleða okkum á degnum verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 75 14 17 17 seinasta 3. mai.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*Og hann sigur við hann: »Fylg mær!« Og hann stóð upp og fylgdi honum.*
*Matt: 9,9*

Í dag sigur Jesus hetta við okkum. Og hann stóð upp fylgdi Jesusi fram gjøgnum lívið. Tað er trygt, tí at Jesus heldur í hond okkara. Ja, evangeliið býður okkum at fylgjast við Jesusi. Hann sigur við okkum: »Komið til mín!«

Gleðiboðskapurin býður okkum at liva lívið saman við Gudi. Vit vórðu fyrstu ferð innboðin í okkara heilagu dópsstund. Vit eru gróðursett í Kristi, og eitt nýtt lív er byrjað. Vit liva av náði og av orðinum, sum ljóðar í kirkjuliðinum.

Kristindómur er ikki bara at hava hesar og hasar áskoðanirnar. Kristindómur er lív. Hetta – at hava Kristus fyri neyðini. Og soleiðis, at hann er okkara andliga føði. Tað er, fegin at vilja fylgjast við Jesusi. Kristindómur er at liva trúnna í kærleika og vón. Tað er at gleðast um at ganga í Jesu fótasporum.

Tæn í kærleika. At liva er at ganga ørindi fyri Jesus í heiminum og tað er at vitna fyri heiminum, hvør Jesus er. Jesus er okkara skapari og frelsari. Hann er Gud og menniskja í einum persóni. Og bara soleiðis kann hann verða frelsari okkara. Vit verða hvønn dag boðin at fylgjast við Jesusi. Spurningurin er so, um vit játta í trúgv ella nokta í vantrúgv.

Gud hjálpi okkum at fylgja Jesusi og ganga lívsleiðina saman við honum.

Amen.

**David Johannesen**



